# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Drápsmenninir hava verið fleiri í tali, men enn hava vit einki spor at ganga eftir*

*(løgreglan í Duisburg)*

## STUTT SAGT

### Funnin druknað

Italska sjóverjan hevur funnið 14 lík, sum róku á havinum millum Tunis og oynna Malta. Sjóverjan sigur, at talan er um afrikonsk flóttafólk, og at fleiri teirra vóru í bjargingarvesti, men bátur var eingin at síggja. Tey 14 líkini róku einar 50 fjórðingar frá italsku oynni Lampedusa, hagar norðurafrikanar í túsundatali eru komnir tey seinastu árini. Higartil í ár hevur italska sjóverjan tikið meiri enn 7.000 flóttafólk upp av sjónum, og umleið 1.600 eru sloppin til Italia uttan hjálp.

### Venja á pólinum

Russar leggja altsamt størri og størri dent á tann stóra áhugan fyri Norðpólinum. Í gjár fór russiska flogvápnið undir eina venjing, sum millum annað ber í sær, at 30 bumbuflogfør skulu venja uppi yvir pólinum. Flogførini kunnu hava kjarnorkuvápn, men í venjingini skulu tey venja seg at skjóta rakettir, at navigera í póløkinum og at fylla brennievni í luftini.

### Afturvaldur

Fyrrverandi ísraelski forsætisráðharrin Benjamin Netanyahu varð í gjár afturvaldur til formann í Likud-flokkinum. Tá næstan allar atkvøðurnar vóru taldar, hevði hann fingið 75 prosent. Netanyahu er leiðari í andstøðuni, og síðani tað miseydnaða kríggið ímóti Hizbollah seinasta summar hevur hann ligið framman fyri Ehud Olmert, forsætisráðharra í meiningakanningunum.

# Lógu skotnir í bilunum




*Teir seks skotnu menninir vóru millum 20 og 30 ára gamlir*

**Seks ungir menn vórðu í nátt funnir skotnir í týska býnum Duisburg. Líkist mest avrætting, sigur løgreglan**

Løgreglan veit ikki, hvor hevur skotið teir seks menninar, ella hví teir vórðu skotnir, men tað líkist mest avrætting og einari uppgerð av einum ella øðrum slagi, sigur løgreglan í Duisburg.

-Vit tosa um seks skotnar menn, sum eru skotnir í høvdið, men vit tosa eisini um fleiri drápsmenn, sigur talsmaðurin hjá løgregluni, Reinhard Pape, við blaðið Die Welt.

Klokkan hálvgum tvey síðstu nátt steðgaði ein maður einum løgreglubili tætt við jarnbreytarstøðina í týska býnum Duisburg. Maðurin segði seg hava hoyrt fleiri skot, og tá løgreglumenninir komu á staðið, funnu teir seks skotnar menn. Fimm teirra vóru deyðir, og tann sætti doyði á veg á sjúkrahúsið.

Nakrir av monnunum lógu deyðir í bilum sínum, og hinir lógu uttan fyri bilarnar. Løgreglan hevur einki sagt um, hvørjir menninir eru, men summar tíðindastovur skrivaðu í dag, at menninir eru svartir, og at talan tí helst var um eina uppgerð millum innflytarar í brotsmannaumhvørvinum.

# Hjúnarlag elvdi til ringastu atsóknina síðani innrásina



*Minst 175 fólk lógu eftirá, og umleið 200 vórðu særd í teirri ringastu bumbuatsókni í Irak síðani innrásina í 2003*

**Eitt hjúnarlag, sum ikki samsvaraði við hugsjónirnar hjá einari irakskari sekt, var helst orsøkin til bumbuatsóknina, sum kostaði 175 mannalív í gjár**

Fyri trimum mánaðum síðani ætlaði ein 18 ára gomul kvinna í Norðurirak at gifta seg við einum ungum manni, sum hon hevði møtt. Trupulleikin var bara, at kvinnan var úr tí lítla trúarbólkinum yazidi, meðan maðurin var muslimur. Men tað var ikki nóg mikið til at forða ætlan teirra, so kvinnan gjørdi av at taka við muslimskari trúgv. Tað skuldi hon ikki havt gjørt. Tá skyldfólk hennara frættu, at hon hevði skift trúgv, bleiv hon tikin og steinað til deyða.

Tað vóru hennara næstu, sum steinaðu hana, og drápið elvdi alt fyri eitt til fleiri atsóknir at fólki úr yazidi-trúarbólkinum. Í einari atsókn vórðu 23 menn tiknir av døgum, og eina aðru ferð vórðu tveir menn burturflyuttir og steinaðir til deyða.

Ein víðgongdur felagsskapur, sum hevur tætt tilknýti til al-Qaeda, hevur eisini skipað fyri fleiri atsóknum og morðum, sum hava samband við tað ætlaða hjúnarlagið og tilburðin, tá gentan bleiv steinað til deyða. Og iraksku myndugleikarnir ivast ikki í, at tann ógvusliga bumbuatsóknin í gjárkvøldið var enn eitt álop hjá hesum sama felagsska pi. Myndugleikarnir vísa á, at bumburnar brustu í bygdum, har nógv fólk úr yazidi-trúarbólkinum búgva.